Havnar leksikon:

# Green Dolphin fórst í Lítlluvík




Í 1949 keypti Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik enska minustrúkaran "Green Dolphin" úr Onglandi.

Skipið var bygt í 1942 og kostaði Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik 135.500 krónur at keypa.

Ætlanin var at skipið skuldi brúkast til innanoyggjasigling, og navnið skuldi vera "Sigmundur".

Tá skipið var liðugt umbygt og klárt at seta í sigling, dreiv tað á land eina illveðursnátt í februar 1950 og gjørdist vrak.

Felagið keypti so annan minustrúkara, ið var systirskip til "Green Dolphin". Hesin fekk so ístaðin navnið "Sigmundur".

"Sigmundur" sigldi í Skálafjarðar- og Sundalagsrutuni frá 1950 til 1967, tá "Tróndur", sum varð keyptur úr Norra, avloysti hann.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647 / 273168.

**Næstu ferð hava vit myndir í samband við virksemi hjá Laurits Chr. Sofus Reinert (1903-1965) skræddara í Havn, vanliga nevndur Skrædder.**




## NØVN Í VIKUNI

### Atli Dam

**f. 12. sept. 1932 d. 7. febr. 2005**



*Tú tráddi leikpall við magnandi veldi*
*tú legði lunnar, har urðargrót var,*
*ein hugsjónarkappi við dreymum úr eldi,*
*har ábært og kalt var, tú laðaði garð.*

*Tú kyndi bál við nýkveiktum brandi,*
*taðaði lendi, har ei áður var sátt,*
*tað lýsti í eystri í nýbornum landi,*
*ein geisandi logi á døkkari nátt.*

*Ein Jahves rødd sum torusláttur,*
*við kenslum sum mjúkasta summarfleyr,*
*ein íborin gudgivin frumaldarmáttur,*
*ið skar gjøgnum myrkursins sand, mold og eyr.*

*Sum alfaðir at einum fjølbroyttum bólki,*
*í heimligum eins væl og almennum skara,*
*tað kravdi gott samstarv og ábyrgd av fólki,*
*her legði tú støði til mangan ein varða.*

*Nú flokkast á ferð móti vesturhøgum,*
*tær mangan fleyg Føniks við lið,*
*kulsandi reisist her fylking av knøum,*
*framá, har tú setti so sjónlig mong stig.*

Eg drýpi høvur í virðing

**Fríður**

## Tøkk



Hjartans tøkk, tit ið valdu meg persónliga til fólkatingvalið.
Góðu bygdarfólk, eg má nevna tykkum og takka fyri tann stóra stuðul, tit hava víst mær og javnaðarflokkinum. Tað fløvar, at so mong standa aftan fyri ein.
Gud signi tykkum øll.

**Mikkjal Sørensen**